Løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 30. apríl 2018

Endamál

§ 1. [1] Búskapargrunnur Føroya skal stuðla undir ein sjálvberandi og haldføran føroyskan búskap við at virka fyri:

1) Búskaparligum sjálvbjargni.
2) Búskaparligum støðufesti og konjunkturjavning.
3) Samhaldsfesti millum ættarlið.

Inntøkur grunsins

§ 2. [2] [1] Inntøkur grunsins verða settar til síðis á fíggjarlóg og í roknskapi landsins á serstaka konto, nevnd Búskapargrunnur Føroya.

Stk. 2. [3] [2] [1] Inntøkur grunsins eru:

1) 20% av uppgjørda RLÚ I úrslitinum upp til 200 mió. kr. í avlopi, og 50% av RLÚ I úrslitinum omanfyri 200 mió. kr. í avlopi.
2) Inntøkur frá einskiljing av landsins ognum.
3) Flyting av fíggjarlóg landsins.
4) Inntøkur frá íløgurøkt grunsins.
5) Tilfeingisinntøkur frá fiskivinnuni.
6) Tilfeingisinntøkur frá alivinnuni.
7) Tilfeingisinntøkur frá kolvetnisvirksemi.

Stk. 3. [2] [1] (Strikað).

Útgjaldskipan

§ 3. [1] Úr Búskapargrunni Føroya verða gjøld flutt til landskassan sambært ásetingunum í stk. 2-5.

Stk. 2. [1] Av tilfeingisinntøkum grunsins frá fiskivinnuni, sbrt. § 2, stk. 2, nr. 5, verða 250 mió. kr. útgoldnar landskassanum, meðan tilfeingisinntøkur frá fiskivinnuni omanfyri 250 mió. kr. árliga verða útgoldnar landskassanum yvir sjey fylgjandi ár í eins stórum pørtum.

Stk. 3. [1] Av tilfeingisinntøkum grunsins frá alivinnuni, sbrt. § 2, stk. 2, nr. 6, verða 150 mió. kr. útgoldnar landskassanum, meðan tilfeingisinntøkur frá alivinnuni omanfyri 150 mió. kr. árliga verða útgoldnar landskassanum yvir sjey fylgjandi ár í eins stórum pørtum.

Stk. 4. [1] Miðal realvinningurin av íløgurøktini fyri fimm tey seinastu árini verður árliga goldin úr Búskapargrunninum inn á fíggjarlógina, treytað av, at støðisfæ grunsins er í minsta lagi 10% av BTÚ og treytað av, at árligi inntøkuvøkstur landskassans undanfarna ár er niðanfyri 0%.

Stk. 5. [1] Tá ið lánsbrøv falla til gjaldingar, skulu hesi ikki endurfíggjast, men rindast úr Búskapargrunninum, í tann mun, tøk fígging er í grunninum. Tó skal støðisognin í grunninum altíð lúka treytirnar fyri sínum parti av minsta gjaldførinum, sum er 10 % av BTÚ. Grunnurin letur ikki landskassanum onnur gjøld ella skatt.

Umsitingarlig viðurskifti

§ 4. Eginpeningur verður sett í virðisbrøv á fíggjarmarknaðinum eftir almennum leiðreglum um størst møguligan vinning við atliti til spjaðing av váða.

§ 5. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum stendur fyri og rindar umsiting av Búskapargrunni Føroya sum serliga roknskaparliga eind við egnari eginogn. Grunnurin er ogn landskassans. Broytingar í eginogn grunsins verða bert roknaðar sum broytingar í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum.

Stk. 2. [2] [1] Landsbanki Føroya umsitur grunnin. Nevndin í Landsbanka Føroya ásetir nærri reglur um røkt av fæ grunsins og ger leiðreglur fyri íløguvirksemi. Reglurnar skulu vera almennar og skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

Stk. 3. [1] Gjørdur verður serligur eindarroknskapur fyri Búskapargrunnin.

Stk. 4. [1] (Strikað).

Ásetingar um gjaldføri [1]

§ 5 a. [1] Búskapargrunnur Føroya kann vera trygd fyri lántøku, tá málið í § 11 í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð skal røkkast. Trygdin kann í mesta lagi verða 10% av BTÚ í undanfarna ári.

Stk. 2. Búskapargrunnur Føroya kann telja við í landsins gjaldføri, tó í mesta lagi við 10% av BTÚ í undanfarna ári.

Gildiskoma

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Stk. 2. Lógin fær virknað fyri alt árið 2011, ið skal vera fyrsta roknskaparár grunsins.

Tórshavn, 7. juni 2011

Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)
løgmaður

Lm. nr. 184/2010

---

[1] Broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 30. apríl 2018.

[2] Broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 20. desember 2016, har § 2 ljóðar soleiðis: “Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.”

[3] Broytt við løgtingslóg nr. 170 frá 23. desember 2011, har § 2 ljóðar soleiðis: “Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, og fær virknað frá 1. januar 2011.”